Summar PRÁT

# Ofta verður valdsgirnd fjald handan orð um Guð

- EG HAVI TRUPULT VIÐ AT GÓÐTAKA **ALDARGAMLAR ÚTLEGGINGAR** AV TILVERUNI, SUM BYGGJA Á **HEILAGAR TEKSTIR**, SERLIGA TÁ TÆR VERÐA **BRÚKTAR POLITISKT** OG **TRÝSTAR OMAN YVIR FÓLK**, SUM HAVA AÐRAR TILVERUTULKINGAR. **FÓLKSINS LÓGIR**, IÐ ERU SKAPTAR GJØGNUM KJAK OG GRUNDGEVINGAR, **SKULU GALDA** Í FØROYUM, SIGUR **HANS ANDRIAS SØLVARÁ**, SØGUFRØÐINGUR. HANN HELDUR, AT SJÁLDAN HEVUR SO **LÍTIÐ SKIL** VERIÐ Á POLITIKKINUM SUM NÚ, OG AT **VANDAMIKLA NÁTTÚRAN** HEVUR GJØRT FØROYINGAR **ÁTRÚNAÐARLIGARI** ENN ONNUR FÓLK



**SAMRØÐA**
Uni Arge
uniarge@gmail.com

Hans Andrias Sølvará hevur í fleiri ár verið virkin í almenna orðaskiftinum um politikk, søgu og átrúnað. Hann skrivaði 1. bind av løgtingssøguni og hevur eisini skrivað Klaksvíkar søgu 1 og 2, søguna um adressumálið frá 1917 og bókina "Guds orð ella orð um Gud." Hann er útbúgvin søgufrøðingur við heimspeki sum hjágrein og starvast sum adjunktur á søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya. Nýliga afturkomin av ferð hinumegin klótuna seta vit honum stevnu í Summarprátinum hesaferð.

### Tit vóru í Nýsælandi fyrr í summar. Hvussu var tað?

Kona mín, Annika, hevur eina vinkonu úr Klaksvík, sum flutti til Nýsælands fyri eini 20 árum síðan. Vit hava ofta tosað um at fara til Nýsælands at vitja hana, og tað gjørdu vit so í summar. Nú segði eg í summar, men í Nýsælandi er hávetur í juli. Nýsæland er tvær høvuðsoyggjar, ein sunnanfyri og ein norðanfyri, og so nógvar smáar oyggjar. Vit búðu í Acklandi, sum liggur á norðuroynni. Auckland er stórbýur við 1,4 milliónum fólkum, men Wellington, sum er nógv minni, er høvuðsstaður. Hóast hávetur var veðrið líka gott í Acklandi sum í Føroyum ein góðan summardag. Nýsælendingar ferðast nógv á suðuroynna í juli at standa á skíð. Har er nógvur kavi í juli. Á middegi í Føroyum er midnátt í Nýsælandi, so alt vendir øvugt. Náttúran er ógvuliga stórsligin. Har eru høg kavaklødd fjøll, nógv gosfjøll og heitar keldur.

### Hvussu er Nýsæland samanborið við Føroyar?

Nýsæland er eitt nýmótans samfelag, sum líkist nógv vesturlendskum samfeløgum. Fólkið er fyri tað mesta evropearar, men har eru eisini nógvir asiatar. Nýsælendingar tykjast tó gera nógv burturúr, at talan er um eina samanrenning millum evropeiska og upprunaliga nýsælendska Maorimentan. Hetta sæst eitt nú á staðarnøvnum. Samfelagsliga eru fleiri munir millum Nýsæland og Føroyar. Skattahámarkið er 34 prosent, og nógv børn ganga í privatskúla. Eitt annað, sum eg legði til merkis, var, at fólk, sum ikki kenna hvørt annað, heilsaðust, tá tey hittust á gøtuni. Hetta líkist kanska einum siði, sum er um at hvørva í Føroyum. Yvirhøvur haldi eg, at Nýsæland politiskt og mentanarliga er eitt konservativt samfelag. Eg hevði tó ikki fatan av, at átrúnaður fylti nógv í samfelagnum.

### Hevur tað stóran týdning fyri teg at sleppa burtur viðhvørt?

Mær dámar væl í Føroyum, men eg haldi, at tað hevur stóran týdning at sleppa burtur av og á. Alt tað, sum er øðrvísi, ger okkum før fyri at virðismeta tað, sum vit fáast við dagliga. Tað hevur eisini stóran týdning at læra aðrar mentanir at kenna, mat, søgu, virðir og tílíkt.

### Tú hevur skrivað fleiri søgubøkur. Hvat er tað mest áhugaverda við Føroya søgu?

Føroyar eru eitt lítið samfelag, her tær flestu funktiónirnar, sum eru í størri samfeløgum, finnast. Hetta er heilt serligt. Føroyar eru, sum enski søgufrøðingurin John F. West segði, eitt laboratorium, her til ber at kanna ymisk samfelagslig fyribrigdi, sum eru nógv truplari at kanna í stórum samfeløgum. Politiska søga Føroya er ógvuliga samansett, serliga tá talan er um viðurskiftini við Danmark, ið fylla rættiliga nógv. Viðhvørt tykjast tey at fylla órímiliga nógv, t.d. í 1923, tá sonevnda Noregsmálið var fyri á løgtingi og í ríkisdegnum. Vit síggja hetta eisini í politikkinum í dag. Hóast keldurnar um Føroyar eru fáar, finnast framvegis fleiri óviðgjørdar keldur, sum bíða eftir, at søgufrøðingar fara undir at kanna tær.

### Tú ert ofta í blaðkjaki. Hvussu vilt tú lýsa føroyska kjakmentan?

Sum heild haldi eg, at kjakmentanin er á einum rímiligum støði, men onkuntíð havi eg kensluna av, at kjakarar ikki vilja skunda undir kjakið, men heldur vilja steðga tí. Eg havi t.d. upplivað at verið kallaður Satans amboð og tílíkt møsn í bløðunum. Tað taki eg mær ikki so nær, men sovorðið skundar ikki undir kjak og er í veruleikanum ikki vert at svara uppá. Vit hava kanska lyndi til at vera persónlig í blaðkjakinum, men sum heild haldi eg, at kjakarar halda seg til evnini.

### Er føroysk kjakmentan framkomnari í dag enn fyri 50-60 árum síðan?

Tann, sum hevur lisið gomul føroysk bløð, t.d. Tingakross og Dimmalætting